90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Uni Arge

# SELMA ELLINGSGAARD



MYND: JENS KRISTIAN VANG

# Eg kann bæði tiga og larma

**HON** SITUR JÚST NÚ OG **TOGAST** UM LØNIR VIÐ **FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ** SAMAN FLEIRI **ØÐRUM FAKFELAGSLEIÐARUM**, OG ONKI FÆR HON SAGT UM GONGDINA Í **SAMRÁÐINGUNUM**. MEN **FORKVINNAN** Í STARVSMANNAFELAGNUM, **SELMA ELLINGSGAARD**, IÐ FYLTI 39 Í GJÁR, **KANN** VERA BÆÐI **STILL** OG **VILL**, SUM HON SJÁLV SIGUR. **BEST** HEVUR HON TAÐ NIÐRI **Á MØLINI** Á EIÐI, TÍ HAR ER BÆÐI **SISSANDI** OG **LÍVGANDI** AT VERA

**Hvussu gjørdist tú forkvinna í Starvsmannafelagnum?**
– Eg varð vald í nevndina á fyrsta sinni, tí starvsfelagar bóðu meg stilla upp. Tá eg so gjørdist næstforkvinna, hevði tað við sær eina serábyrgd, og tá so formaðurin ikki stillaði uppaftur, valdu mínir nærmastu starvsfelagar at skjóta meg upp.

**Hvat hevur arbeiðið í felagnum við sær, hvørjar eru tínar uppgávur?**
– Tað er eitt áhugavert og sera fjølttáttað starv. Uppgávurnar eru alt frá samráðingum til persónsmál. Tað er at verja limanna áhugamál á ein og hvønn hátt. Eg skal mynda felagið úteftir og leiða arbeiðið inni í felagnum. Tað er eitt læruríkt og mennandi starv.

**Tú hevur nevnt, at tú ert vinstravend og reyð sum hjartað, hví ert tú tað?**
– Eg trúgvi, at tað er ein gáva at vera fødd í henda heim, og at vit hava eina skyldu at hjálpast at. Tey, ið eru væl fyri, hava ábyrgd av, at tey, ið ikki hava verið líka heppin í lívsins eydnuhjóli, eisini skulu fáa eitt virðiligt lív.

**Er munur á, hvussu fólk uppfata teg, nú tú ert forkvinna, og so áðrenn?**
– Tað vóni eg ikki, og tað er ikki nakað, eg leggi til merkis. At vera forkvinna er eitt starv sum eitt og hvørt annað starv, og eg vil røkja tað so væl sum gjørligt. Selma verði eg tó altíð. Munurin er kortini, at tú gerst eitt alment andlit, og tað visti eg frammanundan.

**Er Starvsmannafelagið eitt fløkt fakfelag at samskipa?**
– Tað eru avgjørdar styrkir í, at vit eru so mong og hava so fjølbroytt yrki. Avbjóðingin er at røkja øll áhugamálini, og at limirnir kenna seg sum ein part av felagnum. Vit arbeiða við bygnaðinum fyri at samansjóða felagið betur, so áhugamálini hjá limunum kunnu røkjast enn betur.

**Tú tykist ikki at ræðast konfliktir og úttalar teg lættliga í miðlunum. Er tað viðføtt?**
– Hvussu eg eri, ber mær illa til at meta um sjálv. Eg havi helst altíð verið mælsk og torað at sagt mína hugsan. Eitt mantra, eg havi havt í mong ár, er, at tú kanst tosa um alt og siga alt við onnur, um tú sigur tað við virðing. Eg eri sosialráðgevi og meti avgjørt, at mín útbúgving hevur verið mær ein góð hjálp í starvinum sum forkvinna. Eg havi ikki á nakran hátt fingið útbúgving í at úttala meg alment, so helst er tað íborið.

**Eru menn verri at samráðast við enn kvinnur?**
– Nei, tað er ikki mín fatan, og vanliga sita bæði kvinnur og menn við borið. Hetta er ein fyrimunur, haldi eg.

**Hvussu vilt tú lýsa teg sjálva?**
– Eg eri still og vill, tigandi og larmandi, djúphugsin og láturmild. Fjúsið kann vera stutt, men eg blíðkist skjótt aftur.

**Hvat er besta stað á jørð og hví?**
– Tað er og fer altíð at vera mín heimbygd, Eiði. Niðri á Mølini er nakað heilt serstakt fyri meg. Kenslan at vera eitt við náttúruna, bara at vera, er ein sterk kensla, hon er bæði bæði sissandi og lívgandi.

**Hvørji onnur áhugamál hevur tú enn fakfelagsarbeiði?**
– Má viðganga, at fakfelagsarbeiðið fer við sera, sera nógvari tíð. Eg eigi eina deiliga dóttir, og hennara vælferð er sjálvsagt mítt størsta áhugamál. Familju og vinum vil eg eisini hava tíð saman við. Annars havi eg altíð lisið nógv. At ferðast inn í annan heim er nakað serstakt. Mær dámar at vera kreativ, tá ondin er yvir mær, og eg royni at læra meg at spæla guitar.

**Fara vit nakrantíð at síggja teg í politikki?**
– Starvið, eg nú røki, er eitt fakfelagspolitiskt starv. Um eg verði at síggja í politikki annars, kann eg ikki siga. Tað er jú trupult at spáa um framtíðina.